GJALDSTOVAN

Leiðslukunning (LKS) og rokniark

1. flyta úr LKS yvir í rokniark frá
2. flyta úr LKS inn í sama rokniark
3. dagføra dátur
4. stillingar, m.a. velja dátur ið ikki skulu dagførast o.a.
5. broyta fyrispurning
6. dømi um yvirlit yvir dátur fluttar yvir í rokniark

Í LKS ber til at flyta allar síður í LKS yvir í rokniark (Microsoft Excel), dagføra tølini í rokniarkinum og nýta allar hentleikarnar í Excel.

Legg til merkis, at ..

.. allar síður, ið verða fluttar yvir í excel, virka eftir hesum leisti:

- Knýtið til eina síðu í LKS, ið er flutt yvir í excel, verður strikað eftir 24 tímum, t.e. at sessiónin verður strikað, um tølini ikki verða dagførd innan 24 tímar.
- Um tølini verða dagførd eina ella fleiri ferðir, innan 24 tímar, ber eisini til at dagføra aftaná 24 tímar.

Um ætlanin er at dagføra eftir 24 tímar, má fyrsta dagføring henda innan 24 tímar.

1. Flyta yvir í rokniark

Set á **Stilla** og vel **Innles** til høgru út fyri **excel format**.



- Í Chrome trýst á fíluna niðast í vinstra horni á síðuni ..



- Í Explorer trýst á **OK** ..



- Í Firefox trýst á **Åbn** ..



.. og síðani á **Aktivér** fyri at flyta yvir í rokniarkið.



Leinkið til ávísu síðuna í LKS - https://lks.gjaldstovan.gov.fo/lks/.. verður goymt í Excel, og knýtir seg til eitt ávíst umráði í arkinum, á myndini, tað 'blaa' umráðið niðanfyri.



Roknskapar- og játtanar yvirlit	Seinast dagført:15-may-2014 06:14							
Fíggjarár 2014	Rakstur							
Tíðarskeið: sjálvvirkið	Vís samanteljingar: nei							
Landskassaroknskapardømið								
Stovnsnr: 103020 Føroya gjaldstova								
Stovnsleiðari: 490 Leif Abrahamsen								
St.konta	Heiti	Salda 04-2014	Játtan 2014	Avlop 04-2014	Salda 05-2014	Salda 04-2013	Játtan 2013	Avlop 04-2013
11	Lønir v.m.	4.273.728	13.445.000	68%	4.320.589	4.175.482	13.447.000	69%
14	Keyp av vørum og tænastum	647.479	1.525.000	58%	765.829	583.632	1.525.000	62%
15	Keyp av útbúnaði, netto	49.537	240.000	79%	51.137	1.210	241.000	99%
16	Leiga, viðlíkahald og skattur	0	115.000	100%	0	92	115.000	100%
19	Ymsar rakstrarútreiðslur	281	0	0%	281	1	0	0%
21	Søla av vørum og tænastum	0	-45.000	-100%	0	-30.000	-45.000	-33%
57	Rentuútreiðslur o.a.	963	0	0%	963	0	0	0%
75	Keyps-mvg	0	0	0%	28.815	0	0	0%
76	Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt)	-73.407	0	0%	-73.407	-69.023	0	0%
	Tilsamans	4.898.581	15.280.000	68%	5.094.207	4.661.394	15.283.000	69%

Er tørvur á at hava fleiri enn eina síðu í somu excel mappu ella arki, ber til at gera aftur sum omanfyri og síðani sum á næstu síðunum niðanfyri.

2. Fleiri síður í sama ark ella somu mappu

Er brúk fyri at flyta fleiri síður yvir í somu excel mappu, trýst í navnateigin og vel **web_query**.





Viðkomandi umráðið verður frámerkt, trýst á Ctrl + C, fyri at kopiera umráðið.



Vel ein teig í øðrum arki, og trýst á teigin og Ctrl + V, í arkinum kopierað verður til, fyri at seta inn.





Tvær síður úr LKS eru fluttar yvir í sama rokniark og við hvør sínum heitið.





3. Dagføra

Til ber at dagføra tølini í rokniarkinum, uttan neyðugt er at fara inn í LKS, t.d. undir **Data**:

- **Opdater** (**Alt** + **F5**) - dagførir tølini frá tí síðuni, ið er aktivt, T.e. at ein teigur í viðkomandi yvirliti, skal vera aktivur.
- **Opdater alle (Ctrl** + **Alt** + **F5**) – dagførir øll yvirlitini í øllum ørkum í excel mappuni.





4. Stillingar

Egenskaber gevur m.a. møguleika at

- strika knýtið til Leiðslukunning fyri hvørja einstøku síðu, ið er flutt yvir, við at koyra 'flugubeinið' úr **Gem forespørgselsdefinition**. So ber ikki til at dagføra hesar síður aftur.
- stýra um breidd á kolonnum skal tillaga seg ella ikki, tá síður verða dagførdar.







5. Broyta innihald á eini síðu, ið er flutt yvir í rokniark.

Um t.d. áhugi bert er í at roknskapartøl verða dagførd og ikki upplýsingar um fíggjarár, tíðarskeið, dømi, dagfesting o.a. ber til at broyta.

Høgraklikka á viðkomandi síðu og vel **Rediger forespørgsel** ..



.. trýst á fyri at velja og trýst á importér.



So er síðan tillaga og aftur klár at dagføra.



Grein	Heiti	Salda 07-2018	Játtan 2018	Avlop 07-2018	Salda 08-2018	Salda 07-2017	Játtan 2017	Avlop 07-2017
1	Løgtingið	31.557.933	59.561.000	47%	31.607.933	27.897.845	55.895.000	50%
2	Løgmansfyrisitingin	23.070.268	40.557.000	43%	23.536.160	21.003.132	40.609.000	48%
3	Fíggjarmál	201.513.233	331.127.000	39%	208.249.772	182.332.854	323.442.000	44%
5	Fiskivinnumál	94.280.664	259.274.000	64%	97.657.329	95.893.680	182.919.000	48%
7	Mentamál	671.839.849	1.218.959.000	45%	672.962.905	669.501.786	1.180.439.000	43%
11	Heilsu- og innlendismál	662.048.349	1.268.710.000	48%	661.380.286	607.216.050	1.171.051.000	48%
12	Almannamál	871.343.408	1.554.152.000	44%	872.368.053	823.751.904	1.476.787.000	44%
13	Uttanríkis- og vinnumál	77.682.475	119.781.000	35%	78.657.584	75.140.290	142.330.000	47%
17	Samferðslumál	211.825.225	311.789.000	32%	225.074.963	188.851.304	292.953.000	36%
20	Inntøkur	-2.941.572.645	-5.424.640.000	-46%	-3.050.583.950	-3.047.937.274	-5.036.890.000	-39%
	Útreiðslur tils	2.845.161.403	5.163.910.000	45%	2.871.494.985	2.691.588.844	4.866.425.000	45%
	Tilsamans	-96.411.242	-260.730.000	-63%	-179.088.965	-356.348.430	-170.465.000	109%

6. Dømi um dátur fluttar yvir í rokniørk.

Dømi um rokniark, har eitt ark heintar dátur frá fleiri øðrum ørkum, har dátur úr LKS verða dagførdar.



Pengarensl 2008 í 2011

Yvirlit (1)	jan	feb	mar	apr	mai	jun	jul	aug	sep	okt	nov	des	13-16	Sum	játtan 11	%	eftir
Verkætlan 1	61	92	75	151	91	92	1	0	0	0	0	0	0	563	700	80%	137
Verkætlan 2	32	40	69	49	16	45	7	0	0	0	0	0	0	258	806	32%	548
Verkætlan 3	307	396	362	535	382	379	27	0	0	0	0	0	0	2.388	4.362	55%	1.974
Verkætlan 4	15	46	90	114	102	133	65	0	0	0	0	0	0	565	1.544	37%	979
Tilsamans	415	574	596	849	591	649	100	0	0	0	0	0	0	**3.774**	**7.412**	**51%**	**3.638**
2011	415	989	1.585	2.434	3.025	3.674	3.774	3.774	3.774	3.774	3.774	3.774	3.774				
2010	343	881	1.449	2.004	2.731	3.499	4.108	4.683	5.201	5.772	6.266	7.097	7.124				
2009	704	1.695	2.235	2.799	3.293	3.799	4.559	5.265	5.831	6.432	7.321	7.290	8.693				
2008	494	924	1.678	2.351	2.818	3.768	4.166	4.657	5.203	5.859	6.436	7.420	7.294				

Yvirlit (2)	jan	feb	mar	apr	mai	jun	jul	aug	sep	okt	nov	des	13-16	Sum	játtan 11	%	eftir
Verkætlan 1	56	23	43	34	0	-38	0	0	0	0	0	0	0	118	247	48%	129
Verkætlan 2	114	68	70	59	0	-41	0	0	0	0	0	0	0	270	632	43%	362
Verkætlan 3	297	201	225	144	0	-20	0	0	0	0	0	0	0	847	2.236	38%	1.389
Verkætlan 4	169	134	133	107	22	-8	0	0	0	0	0	0	0	557	973	57%	416
Tilsamans	636	426	471	344	22	-107	0	0	0	0	0	0	0	**1.792**	**4.088**	**44%**	**2.296**
2011	636	1.062	1.533	1.877	1.899	1.792	1.792	1.792	1.792	1.792	1.792	1.792	1.792				
2010	579	1.584	2.539	3.110	3.408	3.246	3.246	3.246	3.267	3.446	4.077	5.225	5.344				
2009	409	1.043	1.456	1.832	1.832	1.844	1.844	1.844	1.866	2.032	2.350	2.977	3.362				
2008	564	1.898	2.372	3.543	3.672	3.765	3.785	3.785	3.785	4.016	4.603	5.543	5.672				

7. Tilvísingar, útrokningar o.a.

Í rokniørkum ber til at vísa til ávíst tal, í einum ávísum punti ('celle'), í einum ávísum arki, t.d. um eitt ávíst tal skal við í eina útrokning, ella skal við í eitt ella annað yvirlit í onkrum arki.

Her vera vístir tveir ymiskir hættir, ið virka eitt sindur uppá hvør sín máta:

A. Vísa til ein ávísan teig (celle) við at brúka '**=**' ella '**+**'

B. Vísa til ein teig útfrá ávísum virði við at brúka funktiónina **LOPSLAG()** – Lodret opslag

A.1 Vel teigin, hvørs tal skal brúkast, t.d. í eini útrokning og trýst á antin '**=**' ella '**+**'. Far á teigin, har viðkomandi virði skal heintast, t.d. **C11** (í puntinum **D20** stendur '**=C11**') og trýst á **Enter**.



A.2 Teigurin **D20** kopierar talið í **C11**, st. konta **19 Ymsar rakstrarútreiðslur** og saldan pr. 04-2014.



B.1 Ein onnur tilvísing er **LOPSLAG** (Lodret opslag). Far á ein nýggjan punt og trýst á ***fx***.





B.2 Vel **LOPSLAG** í **Eller vælg en kategori** og trýst á **OK**.



B.3 Fyri at fáa fatur í virðinum, í sama teigi sum í døminum omanfyri, t.e. **281** í puntinum **C11**, verður skrivað **19** í **Opslagsværdi**.



B.4 At velja umráðið, har virðið 19 skal finnast, verður trýst á teigin **A1**, og meðan framvegis verður trýst, verður markørurin togaður oman á puntin **I18**, og síðani verður slept. Nú er umráðið valt.



B.5. Nú eru **Opslagsværdi** og **Tabelmatrix** vald. Tá umráðið og virði leita verður eftir eru vald, verður hugt eftir í hvørji kolonnu talið, ið leita verður eftir stendur. Í døminum stendur talið í kolonnu '**C**'.



B.6 Í **Kolonneindex_nr** verður eitt tal sett inn. Virði 19 (**Opslagsværdi**) stendur í kolonnu **A** og talið **281** stendur í kolonnu **C**. So er kolonna **A** fyrsta kolonnan í umráðnum (**Tabelmatrix**), og sostatt eisini kolonnan valt er at leita eftir **Opslagsværdi** í, og kolonna **C** er triðja kolonnan. Sostatt verður talið **3** skrivað útfyri **Kolonneindex_nr**. Í myndini sæst at virðið 281 (**Funktionsresultat**) er funnið.



B.7 Útfyri **Lig_med** verður **falsk** skrivað og síðani trýst á **OK** ella **Enter**. **Falsk** verður skrivað, tí um **19** (**Opslagsværdi**) ikki verður funnið, so hevur **falsk** við sær, at í puntinum har virðið verður heintað, kemur at standa **#I/T**. Hetta merkir '**Ikke tilgængelig**', t.e. at talið 19 finst ikki í tí kolonnuni, har leitað verður eftir 19. Um '**Falsk**' ikki stendur í, verður bert okkurt annað tal enn 19 valt, og okkurt 'tilvildarligt' tal verður heintað inn í puntin, har eftir ætlan virðið frá kontu 19 skuldi vera.



B.8 Nú vísa báðar tilvísingarnar til sama punt, **C11**, og virðið í ávikivist **D20** og **F20** eru tey somu.



B.9 Um valt verður at dagføra tølini í arkinum úr LKS, ber t.d. til at høgratrýsta á músina onkustaðni í umrðanum, ið er knýtt til LKS (sí punkt 12, á síðu 6 omanfyri), og trýst á **Opdater**.



B.10 Dagføringin hevur við sær, at tvær nýggjar kontur verða lisnar inn í fyrispurningin úr LKS, konta 14 og 15, og tað hevur við sær at tvey nýggj rød verða sett inn millum kontu 11 og 16. Tilvísingarnar og konturnar frá og við kontu 16 og restin niðanfyri, flyta av somu orsøk tvey rød niður. **Legg til merkis** at tilvísingarnar nú vísa til hvør sín punt og tvey ymisk virðir.

- Fyrra tilvísingin vísir enn til puntin **C11** sum upprunaliga, men av tí at konta 19 nú er flutt tvey rød niður, er tað virðið útfyri kontu 15, ið verður lisið inn í puntin **C11** úr LKS .

- Seinna tilvísingin (**LOPSLAG**) finnur framhaldandi virðið 19 í kolonnu A og heintar sostatt sama virðið sum áður inn í puntin, har fyrispurningurin er.



B.11 Til ber eisini at vísa til ávísan tekst eins og ávíst tal í einum ávísum punti ('celle'). Far á ein nýggjan punt og trýst á ***fx***.



B.12 Vel **LOPSLAG**.



B.13 Í **Opslagsværdi** verður skrivað ‘**Tilsamans** ‘. Afturat sjálvum orðinum **Tilsamans** verður, í hesum førinum, eisini eitt millumrúm skrivað aftaná **s**’ið í tilsamans, tí í LKS verður eitt millumrúm lisið við inn í puntin í rokniarkið frá LKS, har **Tilsamans** stendur.

At velja umráðið, har virðið ‘**Tilsamans “** skal finnast, verður trýst á puntin **B1**, og meðan framvegis verður trýst, verður markørurin togaður oman á puntin **I20**, og síðani verður slept. Nú er umráðið valt og í **Tabelmatrix** stendur **B1:I20**.



B.14 Í **Kolonneindex_nr** verður eitt tal sett inn. Virði ‘**Tilsamans** ‘ (**Opslagsværdi**) stendur í kolonnu **B** og talið **4.898.993** stendur í kolonnu **C**. So er kolonna **B** fyrsta kolonna í umráðnum (**Tabelmatrix**), valt er at leita í, og kolonna **C** er onnur kolonnan. Sostatt verður talið **2** skrivað útfyri **Kolonneindex_nr**. Í myndini sæst at virðið 4898993 (**Funktionsresultat**) er funnið.



B.15 Útfyri **Lig_med** verður **falsk** skrivað og síðani trýst á **OK** ella **Enter**. **Falsk** verður skrivað, tí um '**Tilsamans** ' (**Opslagsværdi**) ikki verður funnið, so hevur **falsk** við sær, at í puntinum har virðið verður heintað, kemur at standa **#I/T**. Hetta merkir '**Ikke tilgængelig**', t.e. at '**Tilsamans** ' finst ikki í tí kolonnuni, har leitað verður. Um '**Falsk**' ikki stendur í, verður bert okkurt annað virðið valt, og okkurt 'tilvildarligt' tal verður heintað inn í puntin, har eftir ætlan virðið útfyri '**Tilsamans** ' skuldi vera.



B.16 Tá trýst er á **OK** ella **Enter** verður virðið heintað yvir í puntin **B22**.